# Posta Stamps
## Føroyar

Nr. 9
September 2011



Tórshavn
Mynd: Ólavur Frederiksen

ISSN 1603-0036

Norðatlantex 2011
Jólini 2011
Nýggj postgjøld 1.09.2011
Ársins vakrasta frímerki 2010

Posta
FAROE ISLANDS



# Norðatlantex 2011 í Norðurlanda-húsinum

27. – 28 mai var frímerkjaframsýningin Norðatlantex 2011 hildin í Norðurlanda-húsinum. Hetta var fyri at hátíðarhalda at Føroya Filatelistfelag varð 75 ár tann 28. mai, og at tað í ár eru 35 ár síðani at Postverk Føroya (nú Posta) varð sett á stovn 1. apríl í 1976.

Posta, Føroya Filatelistfelag og Reyði Krossur høvdu hvør sín sølubás. Harafturat hevði Posta eisini eina søguliga framsýning. Gamlir postmøblar vóru settir fram, fyri at vísa hvussu eitt føroyskt posthús sá út í ávíkavist 1920'unum og 1950'unum. Stjórin á Posta, Joel undir Leitinum setti framsýningina og Guðrið Hansdóttir spældi og sang til setanina.

Tvey serstempul vóru gjørd til høvið og tey kunnu bíleggjast á bíleggingarlepa-num.

Ein sera væleydnað framsýningin, sum bæði Posta og Føroya Filatelistfelag kunnu vera sera væl nøgd við.

1




2




3




# Ársins vakrasta frímerki 2010

Frímerkjasavnarar kring allan heim hava atkvøtt millum føroysku frímerkini, ið vórðu givin út í 2010 og úrslitið gjørdist hetta:

Nr. 1 gjørdist frímerkjasmáarkið FO 686-87. Edward Fuglø hevur teknað frímerkini, sum vísa alivinnu.

Nr. 2 gjørdist frímerkið FO 681 ið avmyndar páfirvald. Astrid Andreasen hevur teknað frímerkið.

Nr. 3 gjørdist frímerkið "Grind" FO 685" Teknað hevur Edward Fuglø.

Hepnu vinnararnir eru:

1) Dieter Strohwald
Bad Schwalbach
Týskland

2) Evelin Buntrock
Dresden
Týskland

3-7) Vidmar Romana,Slovenia
Erling Lide, Danmark
Juan le Cossec, Frakland
Brungeau, Frakland
Klaus Lehmann, Týskland



# Vinnaraferðin 2011

Bo Maach-Møller úr Danmark gjørdist hepni vinnarin av ferðini til Føroya, sum gjørdist veruleiki í juni 2011. Við á ferðini var eisini sonur hansara.

Frímerkjadeildin hevði í samstarvi við GreenGate Incoming fyrireikað ymisk áhugaverd tiltøk á ferðini. Millum annað varð vitjað á Sjósavninum í Havn har Ingi Sørensen helt fyrilestur og vísti fram myndir tiknar á havsins botni kring Føroyar, ein túrur við norðlýsinum umframt aðrar útferðir.

Omanfyri síggjast nakrar myndir tiknar umborð á Norðlýsinum.

Tað gleðir okkum at frætta at bæði faðir og sonur vóru sera vælnøgdir við ferðina í Føroyum.

Næsta ár verður aftur møguleiki at vinna eitt hvørt áhugavert. Øll ið taka lut í atkvøðugreiðsluni um ársins vakrasta frímerki verða við í lutakast-inum um áhugaverdar vinningar.

Nærri frágreiðing um hetta verður at lesa í komandi blaði.



# Nýggj postgjøld 01.09.2011

**Brævastøddir**

| Smábrøv | Miðalbrøv | Stórbrøv |
|---|---|---|
| 23 x 17 x 0,5 cm í mesta lagi | 33 x 23 x 2 cm í mesta lagi | Longd + breidd + tjúkd í mesta lagi 90 cm |
| 23 x 17 cm<br>0,5 cm tjúkt | 33 x 23 cm<br>2 cm tjúkt | <br>l+b+t 90 cm |

**Innanoyggja brøv**

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 6,50 | 8,50 | 10,50 |
| 51 - 100 g | | 11 kr | 15 kr |
| 101 - 250 g | | 17 kr | 21 kr |
| 251 - 500 g | | 28 kr | 32 kr |
| 501 - 1000 g | | 38 kr | 42 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 53 kr |

**Evropa og Norðurlond**

*A-brøv*

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 10,50 | 13 kr | 15 kr |
| 51 - 100 g | | 15 kr | 19 kr |
| 101 - 250 g | | 28 kr | 32 kr |
| 251 - 500 g | | 47 kr | 53 kr |
| 501 - 1000 g | | 76 kr | 82 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 126 kr |

**Onnur útlond**

*A-brøv*

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 13 kr | 17 kr | 21 kr |
| 51 - 100 g | | 26 kr | 32 kr |
| 101 - 250 g | | 49 kr | 53 kr |
| 251 - 500 g | | 95 kr | 103 kr |
| 501 - 1000 g | | 158 kr | 168 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 263 kr |

**Evropa, Norðurlond og A-brøv til Íslands**

*B-brøv*

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 8,50 | 10,50 | 13 kr |
| 51 - 100 g | | 13 kr | 17 kr |
| 101 - 250 g | | 26 kr | 34 kr |
| 251 - 500 g | | 45 kr | 53 kr |
| 501 - 1000 g | | 74 kr | 80 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 105 kr |

**Onnur útlond**

*B-brøv*

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 10,50 | 15 kr | 19 kr |
| 51 - 100 g | | 24 kr | 30 kr |
| 101 - 250 g | | 45 kr | 51 kr |
| 251 - 500 g | | 76 kr | 82 kr |
| 501 - 1000 g | | 116 kr | 133 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 210 kr |

Frá vinstru: jólaprýði, jólakort, jólamerkini, ársmappa og árbók 2011














# Jólini 2011

## Jólamerki

Edward Fuglø hevur teknað ársins jólamerki, sum í ár avmynda jólagluggar. Gull-folia er prentað á tekstin og á greinarnar á arkinum og gevur hetta jólamerkjunum eina flotta útsjónd.

Avlopið av jólamerkjasøluni fer sum vanligt til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum. Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr

## Ársmappa

Ársmappan verður givin út í november. Hon er 235 x 202 mm til støddar, og í henni eru øll frímerkini og smáørkini, ið eru givin út í ár. Hefti og postgjaldsmerki eru ikki við í ársmappuni, sum verður seld fyri áljóðandi virði.
Ársmappan kostar 304,50 kr

## Árbók

Árbókin lýsir við greinum og vøkrum myndum allar ársins frímerkjaútgávur. Øll ársins frímerki og smáørk eru sett í lummar í árbókini, sum er A4 til støddar.

Postgjaldsmerkini eru ikki við í bókini. Bókin fæst í tveimum útgávum: donsk/føroysk og ensk/týsk.
Árbókin kostar 350,00 kr.

## Jólaprýði

Posta hevur í fleiri ár givið út jólaprýði. Fyrst við flykrum og síðani við einglum sum myndevni.

Í ár er tað so listamaðurin Anker Eli Petersen, sum hevur staðið fyri sniðgevingini av ársins jólaprýði.

Tey trý myndevnini eru tikin úr trimum ymiskum jólasangum: "Á barnaárum ungum", "Eg gleðist so hvørt jólakvøld" og "Eg eri so spent til jóla".

Jólaprýðið er úr messingi og lagt við gulli. Gyltur snórur er festur í prýðið, so klárt er at heingja upp. Tey eru uml. 8,5 cm til støddar, og verða seld í vakrari eskju - trý ymisk í hvørjari.
Jólaprýðið kostar 95,00 kr. settið, íroknað mvg.

## Jólakort

Í sambandi við jólamerkini gevur Posta eisini út trý jólakort við somu myndevnum. Jólakortini eru dupult og verða tey seld saman við bjálvum.

Jólakortini kosta 25,00 kr settið.

# Útgávur - 7. november 2011




Nýggj útgáva: **Árbók 2011**
Útgávudagur: 07.11.2011
Prísur: **350,00 kr.**




Nýggj útgáva: **Ársmappa 2011**
Útgávudagur: 07.11.2011
Virði: **304,50 kr.**



Nýggj útgáva: **Jólamerkini 2011**
Útgávudagur: 07.11.2011
Virði: **30,00 kr.**

Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo